tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 79 Hósagur 25. apríl 1996 70. árgangur Krónur 7,00

## Heimsins størsta borifyritøka:



# Sera vónbrotin av at verða vrakað í Lopra

*– Meðan vit hava drúgvar royndir at bora á landi í Europa og hava borað í sama undirlendi sum í Føroyum, so hevur Maersk Contractors ongantíð borað í Europa og kortini fáa teir arbeiði, sigur John Beswick, kanningarstjóri í Kenting Drilling*

síða 8-9

**Tommy Petersen:**

## Mugu fáa sama sáttmála við ES sum Noreg og Ísland



síða 4



## Tvørámenn vunnu mest í stóru svimjikappingini í Klaksvík

síða 14-15

**Maersk Contractors**

## Ongin grund til at sáa iva um okkara evni

síða 7



70'ara ROCKUR

Nøgvir rock-klassikarar frá 70'unum, t.d. Queen, Deep Purple, Led Zeppelin, Rolling Stones o.a.

Fyri hvørja fløgu bara........ 149:

TUTL



*- Vit brúka ikki føroyingar til royndarkanin. Vit hava givið eitt tilboð á handilsligum grundsjónarmiðum.*
*- Vit hava eitt navn at liva upp til og vit „spekulera" ikki í eykaroknangum, sigur Maersk Contractors*

*Eingin orsøk at sáa iva um okkara evni:*

# Vit eru ikki í iva um, at vit klára arbeiðið 100%

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað er eingin orsøk at sáa iva um okkara evni at bora holið í Lopra. Vit hava eitt navn at liva upp til. Vit bjóðaðu av handilsligum áhugamálum, og ongum øðrum.

Sigur Stjórin Per Stachr, stjóri í Maersk Contractors, sum skal bora holið í Lopra í sambandi við oljukanningarnar í føroysku undirgrundini.

Per Stachr sigur, at tað tær ongar avleiðingar fyri teir, at arbeiðið er seinkað eitt [illegible]

Tað er viðskiftafólk okkara, Danop, [illegible] bora[illegible] skal.

- Fáa vit eitt rímiligt [illegible] [illegible] at fáa [illegible] til [illegible]

**Eingin grund at ivast**

Per Stachr sigur, at tað er eingin orsøk at ivast í teirra evnum at gera arbeiðið í Lopra.

Tíð at hann aftur vísir til, sum kann lesast millum reglurnar í samrøðuni við umboðsmannin hjá Kenting Drilling aðrastaðni í blaðnum í dag.

Hann hevur yvirhøvur lítið hug at gera viðmerkingar til ein kappingarneyta.

- Men tit kenna orðatilfið um, tey súru berini.

Vit fingu hann tó at svara nøkrum ivamálum. Kenting Drilling reisir í samrøðuni.

Per Stachr vísir aftur, at teir hava ov lítlar royndir til at teir kunnu bora í Føroyum.

- Vit hava einar 40 borat. Kenting Drilling hevur ein-ar sjey. Sjey og veit ikki, hvør er meiri royndur. Vit hava borað allastaðni í øllum sløgum av undirgrund.

Sjálvandi fært tú roynd-ir, allastaðni, har tú arbeiðir, sigur stjórin í Maersk Contractors.

Hann vísir aftur, at Maersk brúkar Føroyar til royndarkanin fyri at fáa royndir, sum kunnu brúkast seinni í Føroyum og aðrastaðni við.

Per Stachr viðgongur, at hava ikki borað á landið í Evropa fyrr, men hann er sannførdur um, at arbeiðið í Lopra ikki er truplari enn so, at teir klára tað fult út.

- Vit hava eitt navn at liva upp til. Vit eru kendir sum álvarsmenn. Vit hava givið eitt tilboð og harvið verður tað.

- Vit leggja ikki arbeiðið okkara til rættis um vit nú kunnu fáa stuðning ella aðra hjálp. Soleiðis arbeiða vit ikki.

Vit arbeiða eftir handilsligum áhugamálum og ongum øðrum.

Við hesum vísir hann eisini aftur, at teir hava givið eitt so lágt tilboð, at teir vóru vísir í at fáa arbeiðið, men at teir so altíð kunnu skriva eykaroknangar, tá ið ikki alt gongur sum ætlað.

Per Stachr vísir eisini aftur gitingunum um, at teir hava keypt boran, sum skal brúkast í Lopra, bara við tí arbeiðnum fyri eyga.

- Boran høvdu vit keypt, men hann kann brúkast í Lopra, sigur hann. Tí koma vit við honum.

Hann váttar eisini, at Maersk Contractors ikki upprunaliga var uppá tal at gera arbeiðið.

- Men vit gjørdu vart við okkum, tí vit hildu, at vit høvdu okkurt at bjóða, sum kundi hava áhuga, sigur Per Stachr.


KOYRI-SKÚLIN BJ
v/ Bjarka Johannesen
Hoyvíksvegur 65 - 100 Havn
Tlf. 14845 ★ 84745
vit avgreiða
★ ØLL ★
KOYRIKORT
Trailar - Buss - Lastbil - Persónbil - Motorsúkklu
Tlf. 14845 - 84745

Frá PIZZARIA
*Nýggjur og størri matseðil!*
Vinarliga bíleggið borð í góðari tíð.
Minnist til heimkoyringartilboðið!
PIZZARIA - Tlf. 18866

Pentium teldu fyri undir *9.000,- kr.*





**Innihald:**
SunLan Minitower kabinet
**Triton** Pentium móðurborð við Pipeline Burst Cache RAM (20% skjótari enn vanlig cache-ram) og PnP Bios 8 MB RAM (2x4 MB - 72 pin)
INTEL Pentium CPU
Maxtor 1080 MB harddiskur PioMode 4 - **3 ars garanti**
Onboard enhanced controller (upp til 4 harddiskar)
PCI 64 bit grafikkort við **S3 Chip (1 Mb D-ram)**
Knappaborð til Win 95
Microsoft mus og musmatta
14" SVGA litrutur við **3 ars garanti**.

| | | |
|---|---|---|
| KBC PENTIUM 75 MHz | einans kr. | 8.995,- |
| KBC PENTIUM 100 MHz | einans kr. | 10.295,- |
| KBC PENTIUM 133 MHz | einans kr. | 11.295,- |
| KBC PENTIUM 150 MHz | einans kr. | 12.295,- |

| Multimedia 1 | Multimedia 2 | Multimedia 6 |
|---|---|---|
| 4xspeed CD ROM | 6xspeed CD-ROM | 6xspeed CD-ROM |
| 16 bit stereoljóðkort | 16 bit stereoljóðkort | Sound Blaster 16 PnP |
| 15W hátalarar | 15W hátalarar | 80W hátalarar |
| Einans kr 1.395,- | Einans kr 1.695,- | Einans kr 2.095,- |

Allir prísir eru við MVG. – Frakt umleið 500,-
KB-COMPUTER
v/Kjell Birknes - Stationspladsen 3 - DK 7620 Lemvig
Tlf.: 0 97 83 66 34 / 0 40 11 66 34 - Fax: 0 97 83 66 34

TILBOÐ
Weekend PIZZA
á kr. 30,-
SKÁIN N. Finsensgøta 20






Boriutgerðin hjá Maersk Contractors, sum Strandferðslan skal flyta til Føroya í næstum

hevur verið nakað danskt felag, sum hevur kunnað átikið sær slíkar uppgávur.

-Nettup tí hildu vit, at vit eisini kundu fáa nakrar uppgávur í Føroyum sum eitt natúrligt framhald av virksemi okkara í Danmark og sumbortelag, ið júst Danop hevur brúkt nógv.

John Beswick sigur annars, at Kenting Drilling leggur stóran dent á, at alt fer rætt fram. -Vit royna at hava eitt høgt etiskt støði, og tí missa vit eisini nógv arbeiði, tí vit rætt og slætt ikki vilja vera við í spælinum.

*-Men sær tú ein vandamiklan útvikling fyri komandi oljuleiting og -vinnu í Føroyum, um flestu tilboðini verða avgjørd út frá sáttmálanum millum Føroyar og Danmark?*

-Tí dugi eg ikki at svara. Men kann bert siga, at vit í longdini, fingu vit arbeiði her, vildu leggja okkum eftir at útvega føroyingum arbeiði í hesi nýggju vinnu. Soleiðis hava vit m.a. arbeitt í Argentina.

John Beswick sigur, at tað í síðsta enda bara er sunn og frí kapping, sum kann tryggja, at kostnaðurin ikki verður ov høgur. Kappingin besta eftirlitið hjá kundanum.

-Tú mást vera sera varin, soleiðis at tú ikki fært eina monopolstøðu, tí tá kunnu tit fáa veruligar trupulleikar, leggur hann afturat.

*Men kann avtalan millum Føroyar og Danmark í tínum eygum ikki vera kappingaravlagandi og í síðsta enda virka sum monopol, har danskar fyritøkur rætt og slætt undirbjóða fyri at fáa arbeiðið?*

-Tað er ikki serliga sunnur útviklingur. Vistu vit, at ein slík avtala millum Føroyar og Danmark fyrilá, tá vit buðu uppá arbeiðið, so høvdu vit kanska hildið okkum burtur. Tú veitt eisini, at kemur tú soleiðis fyri, at har fyriliggur ein ella onnur avtala, sum kann gagna ávísum feløgum, so bjóðar tú bert uppá arbeiðið her einaferð.

Vit fóru víðari enn tað, sum varð lagt upp til í útbjóðingartilfarinum. Vit royndu at skipa projektið soleiðis, at úrslitið gjørdist eitt sera neyvt samarbeiði millum føroyingar og Kenting Drilling.

**Vóni alt er gingið rætt fyri seg**

John Beswick vónar, at alt er gingið rætt fyri seg í hesum projektinum. Hann ætlar sær ikki at koma við politiskum niðurstøðum men vónar fyri føroyingar, at tað er tann besti, sum hevur fingið Lopransboringina.

Men fer Kenting Drilling at liggja frámvið í øðrum projektum í Føroyum ella hevur hetta "tapið" gjørt, at felagið fer at hyggja sær eftir uppgávum aðrastaðni.

-Sjálvandi fara vit at vera við í Føroyum eisini, um okkurt tekur seg upp. Eg kann í hesum sambandi vísa á, at vit í løtuni hava ein sáttmála við bretsku stjórnina. Tá vit buðu uppá hann var tað eitt annað felag, sum fekk uppgávuna. Eg hugsaði, at har mistu vit eina sera góða uppgávu. Tað skuldi tó bert ganga eitt ár, og vit vórðu biðnir um at at taka uppgávuna, tí hitt borifelagið megnaði hana ikki. So hvør veit. Eg eri eitt sera filosofiskt menniskja, sum hevur verið upp í hesum arbeiði leingi. Nú fáa vit at síggja, hvussu gongur.

Vit spurdu at enda John Beswick, um tað kann vera vandamikið og óheppið fyri framtíðar oljuútviklingin í Føroyum, um tað bara verða donsk feløg, sum fáa arbeiðini?

-Um tit vilja hava nakað av sjálvstýri og sjálvsavgerðarrætti, so er tað rætt.

Eg vil tó ikki finnast at støðuni, tí tað eri eg ikki førur fyri, men vil bert siga, at vit høvdu eitt sera gott projekt, sum ikki varð góðtikið. Tað einasta eg havi frætt síðani er ein linja í einum brævi, har tað stendur, at vit fingu ikki arbeiðið.



*Boritornið á Maerskutgerðini*


# RIMMAR BINGO

VIÐ HÓPI AV STÁSILIGUM **VINNINGUM**

**byrjaði í blaðnum 12. apr.**

**(Lesið um vinningarnar á næstu síðunum)**

**ØLL KUNNU SPÆLA VIÐ**
**og fáa nóg nógv tøl til plátuna**
**bert við at tryggja sær ØLL BINGOBLØÐINI**

SPÆLIREGLURNAR, ið eru prentaðar aftanvert á plátuni í fyrsta bingoblaðnum, sum tit eisini fáa, siga heilt einfalt, at fært tú fulla plátu, hevur tú vunnið ein av SMÆRRU BINGOVINNINGUNUM. Øll hesi, sum eisini eru við í lutakastinum um HØVUÐSVINNINGARNAR, skulu merkja innsendingarbjálvan »BINGO«.

Bert 10 tøl RØTT krevjast fyri at vera við í lutakastinum um HØVUÐSVINNINGARNAR. Hesi kunnu øll fáa bert við at fara væl um tøl og plátu/plátur. Við í minsta lagi 10 tølum røttum, men ikki fullari plátu, skulu innsendingarleparnir merkjast »10 RØTT«.

Fyri at lætta um spælið móti endanum, prenta vit við bingolok drignu tølini við ávísing til blaðið, tey vóru í.

***VERIÐ VIÐ FRÁ BYRJAN***

*TRYGGIÐ TYKKUM* **ØLL BLØÐINI**

*Búgva Tygum óhøgliga til blaðsølu*

*GERIST SO BEINANVEGIN* **HALDARAR**

***og fáið blaðið frá bingobyrjan – eisini tað við plátuni***

***Fyll út og send haldaralepan beinanvegin ella ring tlf. 11820***

*JA!* Eg gerist haldari av Tíðindablaðnum Sosialinum og fái blaðið **5 ferðir um vikuna**
**– ØLL BINGOBLØÐINI –**
eisini tað við **PLÁTUNI** 12. apríl 1996

| | |
|---|---|
| q Haldarar í Føroyum: | 230 kr./ársfj. |
| q Haldarar í Danmark: | 425 kr./ársfj. |
| q Haldarar í Danmark (5 bl. í senn): | 340 kr./ársfj. |

Onnur lond/Ymiskir prísir

Navn: ____________

Bústaður: ____________

Bygd/býur: ____________ Tlf. ________

Ókeypis
Sosialurin rindar postgjaldið

*Tíðindablaðið* sosialurin
Postboks 76,
FR-110 Tórshavn